# Lýsingartorgið

**TRIO VILLATELT**
Lítið brúkt, til 4 persónar, sær út sum nýtt, til sølu fyri 2.000,- kr.
*Tlf. 224313*

**5-KRÓNUR**
frá 1969 eru til sølu. 80,- kr. fyri hvørja.
*Tlf. 322289 ella 220142*

**TIL SØLU**
Stórur mikroovnur til sølu fyri 2.500,- kr.
*Tlf. 533491*

**FORSKALLING TIL LEIGU**
Formar við stoypifiner plátum og formklamsum, alt í góðum standi, verða útleigaðir. 18 formar eru 245 x 65 og 11 formar hava aðrar støddir. Fastur prísur pr. form pr. viku.
*Tlf. 322200/ 243377*

**ÓKEYPIS MOLD**
Mold við blandaðari góðsku fæst ókeypis í Hoyvík við at avheinta hana. Vælegnað til ífyllu.
*Tlf. 322200/ 243377*

**KETTBER VEKTBONKUR**
til sølu. Við vektum 60 kg. Stendur fylgja við.
*Tlf. 251572*

**FRÍMERKIR**
Danmark: Ár 2000 + 2001 stemplað (havi). Ynski: Før./GR./DK 2002-2003 (eg tosið føroyskt).
*Tlf. 0045 26747474/0045 86428627 (Danmark)*

**TIL SØLU**
Agnskerari, kveylaraspæl, egningartrakt, sveisiapparat, startari til caterpillar, typa: 3208, kavaraútgerð + luftkompressari.
*Tlf. 286222-267167*

**PARTABRÆV TIL SØLU**
Partabræv í P/F Smyril Line á kr. 5.000,- til sølu fyri hóskandi boð.
*Bill.mrk. 731*



## Sethúsini Suðurrás 10, Tórshavn, til sølu





Húsini eru í 3 hæddum. Kjallari og miðhædd á 84 kvm og loft á 75 kvm. Grundøkið er 400 kvm. Byggiár 1974.

Í kjallararnum er íbúð við køki, stovu, kamari og wc. Eisini er vaskirúm, hjallur, fýrrúm og kjallararúm við trappuuppgongd.

Í miðhæddini er køkur, stova, 2 kømur, baðirúm, gongd og durur.

Á loftinum er stova, 2 kømur, wc og lítil gongd.

Húsini og havin eru vælhildin. Húsini standa í friðarligum barnavinarligum umhvørvi og stutt er oman í býin.

Áhugað ringið **223369**

Sosialurin
Veðrið
Bilar
Lýsingar
Tíðindi
Viðmerkingar
Ítróttur
Nøvn
Skráir

# HEILSANIR



**Góði babba**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum tann 16. juli. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan Jacoba**



Vit vilja hervið takka øllum tykkum, sum vóru við til at gera silvurbrúðleypsdagin hjá okkum ógloymandi. Hjartans tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til. Somuleiðis takk fyri gávur, telegramm, blómur og uppringingar.
**Vinarliga Jógvan Elias og Edith á Løgmansbø**



30 ár



**Góði Rókur**
Hjartaliga tillukku við 24 ára degnum í dag. Alt tað besta.
**Tín Marid**



**Góða mamma og vermamma**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum. Ja, tíðin gongur skjótt. Her var tú ung og kløn.
**Heilsan dóttir og versonur**



**Góði skiparin stóri**
Vit umborð á Dúgvuni ynskja tær ein góðan túr til New Foundlands.
**Heilsan arbeiðsfelagarnir umborð á Dúgvuni**



**Góða kona**
Hjartaliga tillukku við 70 ára degnum. Alt gott í framtíðini.
**Ynskir maður tín**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:........................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................
..................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .........................................................................
Bústaður: ....................................................................
Bygd/býur: .................................. Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

veitst tú ikki tað?
Sosialurin



# TILTØK

**Hebron, Argir**
www.hebron.fo

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 11.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus – ein av okkum.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00: Hámessa v/ Pater Jude Kulas í Mariukirkjuni.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl 11 morgunmøti. Fríðtór Debes talar á møtinum.
Øll eru vælkomin
www.rhema.fo

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Fríggjakvøldið kl. 20.00 ungdómsmøti. Leygardagin kl. 17.00 landsbøn. Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Ebenezer**
Leygarkvøldið kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10.00: Breyðbróting, kl. 18.00: Evangeliskt møti, kl. 21.00: Útimøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Albin Johannesen.

## BRÚDLEYP

Fríggjadagin 18. juli kl. 15.00 giftast í Ebenezer Silja á Borg Madsen, Argir, og Jóhannes Færø, Klaksvík. Veitslan verður fyri innbodnum kl. 19.00 á Hotel Føroyum.

Leygardagin 19. juli kl. 17.00 giftast Barbara á Plógv og Hugin Skaalum í Sørvágs kirkju. Brúdleypið verður hildið í Róðrarneystinum í Sørvági kl. 19.00 fyri innbodnum.
Sama dag verður sonur teirra doyptur.

Leygardagin 19. juli kl. 16.30 giftast í Porkeris kirkju Oddvá Hansen, Porkeri og Robert Thomsen, Tvøroyri. Veitsla verður fyri innbodnum í høllini í Trongisvági kl. 19.

Leygardagin 19. juli kl. 16.00 giftast í Dals kirkju Borgny Johannesen, úr Dali, og Thomas Brünings-Hansen, Århus. Veitsla verður fyri innbodnum.

Leygardagin 19. juli kl. 18.00 (er broytt frá kl. 17.00) giftast í Havnar kirkju Laila Jacobsen og Jan Joensen. Veitsla verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum á Argjum kl. 19.00.

Leygardagin 19. juli kl. 16.00 giftast í Betesda í Klaksvík Vígdis Kristiansdóttir og Jógvan Skorheim. Veitslan verður hildin á Hotel Norð á Viðareiði kl. 19.00.

Leygardagin 19. juli kl. 16.00 verða Marin á Brúnni, Fuglafjørður, og Per Højgaard, Tórshavn, vígd í Dómkirkjuni. Veitsla verður fyri boðnum í B36-húsinum.

## SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 22. juli kunnu hjúnini Jonhild og Óla Jákup Kruse, Oyrabakka, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í heiminum leygardagin 26. juli frá kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 70 ÁR

Í dag, 17. juli, fyllir Sigrid Jacobsen í Vági 70 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá dóttrini í Lauritsargøtu 7, Tórshavn.

Leygardagin 19. juli verður Hilmar Bech, Porkeri, 70 ár.

## PRÓGV

28. mai fekk Sóley Staksberg, Tórshavn, prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur frá Hvidovre Hospital.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 20.00: Kongsins Herlið. 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 20.00: Ungdómsmøti.
Leygardagin After Eight, høllin er opin frá kl. 13.00–15.00.
Sunnudagin kl. 11.00: Gudstænasta. Sunnudagsskúlin er í summarfrí. Lýst verður tá byrjað verður aftur.
Mánakvøldið kl. 20.30: Bønarmøti.

**Saron, Vestmanna**
Telefonandaktin 424741

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00: Opið hús.
Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti við Tummas Jákup Høj o.fl. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Frá Lívsins Orð**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30. Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20.00.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl.11.00: Møti við André Matras. (Barnaansing meðan møtið er). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K, Klaksvík**
www.kuff.fo

**Betania, Skopun**
Í kvøld kl. 20.00: Bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Evangelisk møtir í skúlanum í Skúvoy**
Fríggjakvøldið kl. 20: Evangeliskt møti.
Leygardagin kl. 14: Barnamøti, kl. 16: Útimøti um viðrar, kl. 20: Evangeliskt møti, aftaná hugnaløta við kaffi. Sunnudagin útimøti kl. 14.30. Herman og Gigga, Tórmund og fleiri luttaka.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11: Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánakvøld kl. 21: Bønarmøti. Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

**Felagið Tórshavn: Gongutúrur**
Sunnudagin 20. juli verður Kommunumarkið gingið: Hósvíksleitið, Vørlufjall og Árnadalstind. Farið verður av Kunningarstovuni. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding!

**Eysturoyar Gongufelag**
Sunnudagin 20. juli verður túrurin Postulakirkja á skránni. Farið verður frá Vestmanna. Frásøgumaður er Jaspur Olsen. Vit møtast á Shell støðini í Vestmanna kl. 14.00.

**Summarkonsertir í Havnar kirkju**
Leygardagin 19. juli kl. 11.30 verður matiné í sambandi við Summartónar. Tað verða andaligir fólkasangir og Kingo-sangur við fleiri ymiskum luttakarum, ið fara at syngja.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
**Frá 1. juli til 18. august hava vit opið frá kl. 13.00-17.00.**
Á ólavsøku verður fotoframsýning av útoyggjamyndum í kjallaranum í Tilhaldinum hjá Hjalmari Waag Høgnesen.
Á miðhæddini verður møguleiki at fáa sær ein drekkamunn og okkurt heimabakað.
Tilhaldið hevur átikið sær at hava móttøkuhúsið opið á ólavsøku.
Opið verður 28.-29. juli kl. 15-19.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.30
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Javni**
Skrivstovan er *stongd vegna summarfrí.* Opið er aftur 11. august 2003.
Hevur tú atrokandi boð ella spurning, so ring til lim í starvsnevndini ella økisnevndini.
Heimasíðan: www. javni.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er farin í feriu frá 26. juni til 1. september.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




Hósdagin 17.07. kl. 19[00]
Hósdagin 17.07. kl. 22[00]




Hósdagin 17.07. kl. 19[30]




Hósdagin 17.07. kl. 22[15]

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning Fríggjadagin 18.07**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**